Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting: 12.01.2026
Mál nr.: 25/28403
Málsviðgjørt: HI

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 40 frá 16. mai 2024 um pantskipan fyri íløt

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
Eingin § 4 a. er í høvuðslógini.	**§ 4 a.** Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at verður skjalprógv ikki veitt innan ásettu freist sambært § 4 stk. 2, 2. pkt., kann pantumsitarin krevja eina upphædd, grundað á tað hægra vekttalið ella litratalið upplýst av TAKS, av vøru fevnda av § 2, stk. 2. *Stk. 2.* Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um upphædd, roknihátt, gjaldfreist, rætting av kravinum, afturbering av goldnum kravi, og burturfall av kravinum, fevnt av stk. 1. *Stk. 3.* Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at krav, sum ikki kann rættast, orsakað av vantandi skjalprógvi, innan ásetta gjaldfreist sambært stk. 2, stendur við, hóast rættað skjalprógv verður veitt, eftir at gjaldfreistin er farin. *Stk. 4.* Rinda innflytarar ella framleiðarar ikki kravið innan ásettu gjaldfreist sambært stk. 2, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu.

	Stk. 5. Krav, sum er fallið til gjaldingar sambært stk. 2, kann verða innheintað av TAKS við panting ella við afturhaldi av A-inntøku eftir somu mannagongdum sum § 4, stk. 6 og 7.